SKALFLEX

BETONGMÁLING
og
RELIEFFPUSS

við 10 ára garanti fæst hjá

ARNA SAMUELSEN
Tlf. 55775 — 3870 Klaksvík

Haldarar uttanlands

Teir haldarar uttanlands, sum koma heim í summarfrítíðini, og vilja hava blaðið sent til bústaðin heima, verða bidnir um at boða blaðnum frá **skrivliga**. Saman við nýggja bústaðnum skal eisini bústaðurin uttanlands vera viðmerktur.

SOSIALURIN
postrúm 76 — 3800 Tórshavn

Bussleiðin á ólavsøku

Koyrt verður eftir koyriskipan I (hálvur tími millum bussarnar)

Ólavsøkuaftan 6,30—01
Ólavsøkudag 8.00—01

Ruta 5 (Miðbýur - J. Broncksgøta - Busatangi - Miðbýur) verður ikki koyrd.

Ruta 3 (Miðbýur - Ternuryggur - Miðbýur) koyrir eftir Bøkjarabrekku - R.C. Effersøesgøtu — J. Broncksgøtu í staðin fyri eftir Aarvegi - Eystaru bryggju.

Allar ruturnar ganga út frá innvikunum í N. Winthersgøtu.

Tórshavnar býráð

Heldur tú ikki **sosialin**



Summarfrí

Vit hava stongt vegna summarfrí frá 30.7. til 13.8.

P.F. SNIKKARAVIRKIÐ
J. Paturssonargøta 34

Ólavsøku-tilboð

Kaffi 1/4 kg	**11.50**
Champignons gløs	**6.35**
Asparges	**5.90**
Egg	**stk. 0.60**
Ostur havarti	**4.50**
Juice 2 l	**10.00**
Te Liptons	**9.85**
Rosinur	**4.00**
Fruktgreytur	**7.65**

Jacob Lützen

Tlf. 11514

Kirkjudagar í Klaksvík

Kirkjuráðið í Klaksvík saman við samkomunum í Emmaus, K.F.U.M & K. og skótunum bjóðar hervið til kirkjudagar í CHRISTIANSKIRKJUNI í døgunum frá 5. september til 9. september.

Evnið á stevnuni verður HIN KRISTNI FELAGSSKAPURIN, sum verður viðgjørt bæði í gudstænastum, bíbliutímum, sangtímum og fyrilestrum.

Øll eru hjartaliga vælkomin bæði til einkultar dagar og alla stevnuna.

Fullfiggjað skrá verður lýst seinri.

Fyri uttanbíggjar luttakarar verður møguleiki fyri at fáa innivist við at ringja til hesi nummør: 5 51 37 — 5 51 83 — 5 56 24 — 5 50 49 — 5 50 20.

KIRKJURÁÐIÐ

Starv sum kommunuskrivari

Frá 1. oktober 1979 er starvið sum skrivari hjá kommunufelagnum leyst at søkja.

Arbeiðsøkið hjá skrivaranum er, at hava dagligu umsitingina av teimum málum, sum kommunufelagið arbeiðir við og má skrivarin ti, umframt at duga at málbera seg skrivliga, eisini duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Lønin verður ásett eftir avtalu.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum og við lønarkrøvum umsøkjarans, skal sendast til Føroya kommunufelag, Runavík, postbox 73, í seinasta lagi 31. august 1979.

Føroya Kommunufelag